

# Cairn fýra brunnar í Grønlandi í ár

**GRØNLANDSOLJA Skotska oljufelagið Cairn Energy hevur nú gjørt av at bora ikki færri enn fýra leitibrunnar í Vesturgrønlandi í ár. Í fjør boraði felagið 2-3 brunnar.**

Jan Müller

Tað gongur við rúkandi ferð. Skotska oljufelagið Cairn Energy, sum í fjør staðfesti olju og gass í grønlendsku undirgrundini, hevur nú gjørt av at bora ikki færri enn fýra brunnar í Vesturgrønlandi í ár. Felagið hevur longu nú tryggjað sær eitt boriskip og ein boripall til umfatandi uppgávuna. Hetta boðar felagið frá í einum tíðindaskrivi í dag.

– Sáttmálin um at brúka bæði eitt boriskip og ein boripall fer at økja um boriorkuna og eisini gera tað lættari umframt at hetta verður gjørt fyri at seta fokus á trygdina sigur Bill Gammell, stjóri í felagnum. Tað ræður eisini um at troyta tíðina mest møguligt, tí tíðin, tá borast kann í Grønlandi, er sera avmarkað.

Grønlendska landsstýrið hevur sett sera umfatandi krøv til oljufeløg, ið bora í Grønlandi og eitt teirra er, at feløgini skulu hava tveir boripallar ella skip til hvørja uppgávuna fyri harvið at tryggja seg betur, um eitt óhapp skuldi hent. Skuldi okkurt gingið galið so er hitt skipið á staðnum til at bora ein brunn, ið skal fyribyrgja ella avmarka dálking.

Farið verður í gongd treytað av góðkenning frá landsstýrinum. Ein kann siga, at Grønland við hesum fýra brunnunum er við at leggja seg væl frammanfyri Føroyar, tá talan er um talið av brunnum og skjótleika. Við hesum tempo er ikki ov nógv sagt, at Grønland kann gerast tað landið í Útnorði, sum fyrst fer at raka við lønandi oljufund.

Í komandi viku fer ein stór grønlendsk sendinevnd við landsstýrisformanninum og høgtstandandi embætisfólki eitt nú innan oljufyrisitingina til Noregs at tosa um møguligt samstarv. Tey skulu hitta kong, forsætisráðharran og síðani Statoil og vitja fleiri av norsku oljufyritøkunum.

jan@sosialurin.fo

# Vitan úr Føroyum skal finna fjalda norska olju

**SUB-BASALT – Royndir og vitan frá boringum á føroyska landgrunninum kunnu hava stóran týdning fyri okkum, nú vit saman við umleið 20 oljufeløgum royna at loysa gátuna, hvat er undir basaltinum í Norskahavinum sigur Lars Jensen frá norska Oljudirektoratinum.**

Jan Müller

Nú olja og gass eru framleidd í Norðsjónum í meira enn 40 ár verður alla tíðina roynt at finna fram til, hvar møgulig nýggj fund kunnu gerast. Tosað verður ma. um leiðirnar við Lofoten og Vesterålen og Barentshavið. Men enn ein stór leið í Norskahavinum, sum er so gott sum ókend fyri bæði myndugleikar og oljufeløg, eru stóru økini út fyri Møre, eisini nevnd Møre og Vøring háslættarnir. Her er undirgrundin eins og við Føroyar fjald av basalti. Dýpið er eisini stórt. Vónirnar eru at finna kolvetni undir basaltinum, og í hesum sambandi kunnu royndir og vitan frá boringum og kanningum við Føroyar og hinumegin markið í bretskum øki koma Noregi til hjálpar.

Norska oljudirektoratið hevur í eina tíð roynt at samskipa kanningar í hesum nýggja økinum, sum higartil hevur verið at meta sum eitt granskingarøki. Tvs. at umleið 20 altjóða oljufeløg eru við í hesi verkætlan og rinda umleið 200.000 kr. um árið fyri at vera partur av einum samtaki, ið hevur til endamál at kortleggja, hvat kann goyma seg undir basaltinum. Shell hevur borað tveir brunnar í einum parti av hesum stóra økinum. Annars goymdi olju og gass men var tó ikki lønandi. Hin var turrur. Hetta hevur tó ikki tikið vónina frá stóra samtakinum.

Norska blaðið Dagens Næringsliv skrivar, at arbeitt verður miðvíst við eini ætlan at kanna økið, áðrenn farið verður at bora ein brunn. Kostnaðurin av einum brunni kann koma uppá eina milliard krónur, og áðrenn borurin verður settur í vilja oljufeløg og myndugleikar royna at gera sítt heimaarbeiði væl og virðiliga.




*Statoil boraði fyrstu ferð gjøgnum føroyska basaltið í 2006 við hesum pallinum. Nú fimm ár seinni fer felagið aftur at seta borin í basaltøki við Føroyar*

Mynd Jan Müller

## Áhugaverd kanningarúrslit

Lars Jensen jarðalisfrøðingur og verkætlanarleiðari í Oljudirektoratinum sigur við blaðið, at tey hava savnað alt tilfar um økið og basalt síðani 2006. Eisini eru gjørdar serstakar seismiskar kanningar. Í 2008 gjørdi samtakið av at royna nýggja kanningarháttin við elektromagnetismu. Tíðliga í hesum árinum verður úrslitið av hesum kanningum kunngjørt sigur Lars Jensen og leggur aftrat, at tað sær sera áhugavert út. Tá verður meira greitt, hvat feløg og mynduleikar ætla fyri at loysa gátuna um fjalda norska oljudreymin.

Og tað er her, at vitan frá leitingini við Føroyar og vestan fyri Hetland kann koma samtakinum til góðar. Lars Jensen vísir á, at Statoil í 2006 boraði ein brunn inn á basaltøki við Føroyar. –Vit brúka føroysku royndirnar í okkara metingum og arbeiði, nú stórur partur av føroyska landgrunninum er "subbasalt" tvs. at basaltløg fjala møguligar olju- og gasskeldur. Tað er sera týdningarmikið fyri okkum at sammeta okkara kanningar við ta vitan man longu hevur ognað sær í Føroyum og vestan fyri Hetland.

## Statoil fleirlanda-strategi

Áhugavert er helst eisini at tengja gongdina í Føroyum og vestan fyri Hetland uppí tað, sum nú hendir á norskum øki. Ein kann ímynda sær, at ein av orsøkunum til, at Statoil er so virkið á føroyska landgrunninum eins og í økinum á bretska landgrunninum tætt upp at markinum, te. Rosebank/ Lochnagar, er tann, at tess virksemi í hesum økinum á Atlantsmótinum kann gagna felagnum og harvið Noregi á risastóru basaltøkjunum í Norskahavinum, sum kunnu goyma nógva olju og gass.

Vit hava fregnast hjá Statoil, um eitt samband er millum áhugan hjá felagnum á Atlantsmótinum (tvs. vestan fyri Hetland og við Føroyar) og so vónirnar til at finna olju og gass á basaltøkjum í Norskahavinum. Ein ónavngivin kelda sigur, at hetta als ikki kann útilokast, ja entá at hetta er heilt logiskt. Statoil er tað felagið, sum hevur flestu leitiloyvi í Føroyum og sum hevur bundið seg til at bora tveir brunnar komandi tvey árini. Í seinasta útbjóðinarumfarinum vestan fyri Hetland fekk Statoil fleiri týðandi teigar rundan um Rosebankfundið, har tað eisini er basalt. Ein niðurstøða av hesum kann tí hugsast at vera, at helst arbeiðir Statoil út frá eini teori um, at tað kann tæna felagnum í royndunum at finna olju og gass undir basalti, at hava eina samlaða strategi, sum umfatar trý lond, Noreg, Shetland og Føroyar.

jan@sosialurin.fo